# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TEIR TAKA FRÆLSI AT VELJA

Nakrir tingmenn vórðu vrakaðir við síðsta løgtingsval. Nakrir aðrir mundi verði tað. Teir megnaðu ikki at fóta sær í nýggju valskipanini, nú føroyingar kundu velja sum teimum lysti til løgtingið. Sosialurin gjørdi í heyst eina kanning sum vísti, at meiriluti var á tingi til tess at venda aftur til gomlu skipanina, og mín sann um tað ikki vóru teir, ið fólkið hevði vrakað, men sum kortini vóru komnir inn gjøgnum bakdyrnar, sum hálsaðu um. Hesir garpar sita nú á tingi og virka fyri at skrúva tíðina aftur – bara fyri sjálvir at verða betur tryggjaðir.

Tað er alt í lagi, at vit eru ósamd í hesum máli. Men tað er ikki í lagi, at okkara fólkavaldu á hendan hátt skalta og valta við fólkaræðisliga miðdepli okkara, løgtinginum.

Vit hava fyrr á hesum stað víst á, at tilgongdin ikki var tann rætta, tá fyrrverandi løgtingsforaðurin trumlaði broyttu valskipanina gjøgnum tingið. Men vit halda kortini, at hetta er ein betri skipan. Tí hví skal ein sandingur velja ein sanding, bara tí at hann er sandingur, og hví skulu havnarfólk ikki sleppa at velja Jóannes Eidesgaard ella Anfinn Kalsberg? Skipanin við valdømunum bidur veljarar í ófrælsi, og hon ger týðuligan mun á politisku flokkunum. Tað er ikki í ordan.

Hvussu skulu vit taka slíkar menn – tí tað eru bara menn sum vilja hava fleiri valdømi - fyri fult? Har ímillum eru menn, sum upp til fleiri ferðir hava lagt uppskot fram á ting um at skipa landið sum eitt valdømi – langt áðrenn javnstøða og annað var upp á tal. Vit kenna fyribrigdið »breyðpolitikarar« – politikarar, hvørs einasta endamál er at sleppa framat – at sleppa at sæta sjálvum sær.

Um ætlanirnar um at skipa landið aftur í fleiri valdømi verður egg ella ungi fæst at vita seinni í dag. Men mátin, sum løgtingið hevur viðgjørt hetta mál, vísir, at eitt løgting als ikki eigur at sleppa at taka slíkar avgerðir. Tí tá tað nú einaferð og kanska tvær ferðir er gjørt í óðum verkum, so fer tað at endurtaka seg seinni. Tí er tað einasta rætta, at hendan heimildin verður tikin frá tinginum – ella at gjørt verður, sum tá valrættaraldurin í 1984 varð broyttur frá 20 til 18 ár, at avgerðin skuldi takast av tveimum løgtingum við einum løgtingsvali ímillum – broytti valrættaraldurin fekk tí ikki virkna fyrr enn í 1988.

Vit kunnu so bara vóna, at tingið heldur fast um ta skipan, sum er galdandi. Tí at fara aftur til fleiri valdømi nú er at gera hetta lítla landið nógv minni enn tí tørvar at vera. Tað fer eisini at taka frælsi frá okkum at velja tey fólk á ting, sum vit vilja hava at sita har.



**Teir vrakaðu vilja broyta til tað gamla**

---

# Klippfisk bjóðar til Nóllywood

Klippfisk bjóðar nú ungum føroyskum filmsspírum á summarskúla í Nólsoy, nevndur Nóllywood.

– Ert tú millum 13 og 17 ára og hevur brennandi hug til at gera film, so er tað tær, vit leita eftir, sigur Jan Berg Jørgensen frá Klippfisk.

– Saman við 11 øðrum ungum sleppur tú í sjey dagar at gera ein stuttfilm – frá hugskoti til lidnan film – framleiddur undir kønari vegleiðing av vandum, ungum filmsfólkum, sigur hann.

Skeiðið verður frá 12. til 18. juli í Nólsoy. 12 ung í aldrinum 13 til 17 ár sleppa við, og undirvísarar verða fýra fólk frá Klippfisk og Blanka. Kostnaður: 2.000 kr. fyri hvønn, íroknað ferðing, mat, bústað, tilfar, undirvísing.

Meldast skal til innan 1. juni – tú meldar til á www.klippfisk.fo/nollywood

Á myndini síggja vit Mariu Winther Olsen, sum saman við Klippfisk hevur tikið stig til skúlan. Maria er dóttir Per Zachariassen, sum er ein av fremstu sjónvarpsframleiðarunum í Danmark.

*eirikur@sosialurin.fo*






## Listafólk longri freist

INGI JOENSEN
KJAK Á SÍÐU 36



## Søguligur dagur í Vágum

FRANK DAVIDSEN
KJAK Á SÍÐU 35

# Lívsins Vatn gott skotsmál í USA




Lívsins Vatn fær 9 av 10 oljuberum á amerikanska portalinum SpiritsReview. Ummælarin gevur føroyska snapsinum framúr skoðsmál og skrivar m.a.: *»Eitt væl úr hondum greitt delikat akvavitt við sera týðuligum smakki. Óvanliga bleytt og tó við sterkum eyðkennum.«*

Umfram jaligu umrøðuna hevur SpiritsReview kosið Lívsins Vatn til *»Featured Spirit of May«*.

SpiritsReview er ein portalur í New York, ið burturav skrivar um og ummælir brennivín. Ummælið av Lívsins Vatn kann lesast her: http://www.spiritsreview.com/home.htm

# Reklamuslogan fyri Føroyum

»Føroyar, eitt frítíðarparadís fyri menn, ið tørva eitt andarúm – at sleppa burtur úr kvinnudomineraða heiminum. Tú kanst vera ein maður upp á tann gamla mátan og njóta tað gamla Evropa!«

*Lisið á Facebook*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo